# Útisetar óttast eisini CTD

**Fríggjadagin fingu føroyskir útisetar í Esbjerg eina frágreiðing um sjúkuna Carnitin Transporter Defekt, sum er nógv meiri vanlig í Føroyum enn aðrastaðni**




*Carnitin Tronsporter Defekt er ongastaðni so vanlig sum í Føroyum*

*Mynd: Árni Joensen*

HEILSUMÁL
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað var heimasandsmaðurin John Jensen, sum býr í Esbjerg, ið hevði fingið tann fremsta danska serfrøðingin á økinum, gengranskaran og professaran Flemming Skovby, til Esbjerg at greiða føroyingum har frá teirri lúnsku sjúkuni. Sjálvur hevur John Jensen mist tvey børn í 30 og 21 ára aldri av Cernitin Transporter Defekt, og í hesum sambandi hevur hann fleiri ferðir havt samband við Flemming Skovby, sum dagliga arbeiðir á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Tað serliga við Carnitin Transpoter Defekt er, at hendan sjúkan hevur nógv fleiri berarar í Føroyum enn ankra aðrastaðni. Kanningar hava víst, at í Avstralia er ein CTD-berari fyri hvørji 37.000 - 100.000 fólk og í Japan ein fyri hvørji 40.000 fólk. Men í Føroyum er ein berari fyri 560 - 5.700 fólk, og blóðroyndir av føroyskum nýføðingum hava víst, at tað rætta lutfallið er helt, at tað er ein berari fyri hvørji umleið 700 fólk í Føroyum.

Sambært danska granskaranum er frágreiðingin um tann óvanliga títtleikan í Føroyum rættiliga einføld:

-Siga vit, at tað vóru 20 fólk úr Vesturnooregi, sum búsettu Føroyar, so er niðurstøðan tann, at eitt av teimum tjógu bar Carnitin Transpoeter Defekt við sær til Føroya, sigur Flemming Skovby.

Hann vísir í hesum viðfangi á, at tað er væl kent í øðrum fjarløgdum samfeløgum, at fólk hava eitt ella annað eyðkenni, sum er sera vanligt samanborið við samfeløg, sum hava havt meiri samband við onnur fólk. Í so máta hava Føroyar ligið einsamallar úti í havinum uttan stórvegis samband og tískil eisini uttan stórvegis íblanding frá øðrum fólki.

## Útisetarnir

Fundurin í Esbjerg fríggjadagin vísti týðiliga, at føroyskir útisetar kenna seg ikki heilt tryggar eftir tað, sum er komið fram um Carnitin Transporter Defekt ta seinastu tíðina. Tað kom eisini fram, at nøkur hava longu verið hjá lækna ella á sjúkrahúsi og tikið blóðroynd fyri at fáa at vita, um tey bera sjúkuna. Onkur vísti á, at børn hjá føroyingum í Danmark verða ikki skrásett sum føroyingar og "hvørva" tí í skipanini sum donsk børn og danir.

Flemming Skovby greiddi frá, at í dag fáa allir nýføðingar tilboð um blóðroynd, sum kann avdúka, um teir eru CTD-berarar. Frammanundan hevur Serumstovnurin blóðroyndir av øllum, sum eru fødd aftan á 1982.

Men hvussu við teimum, sum eru fødd fyri 1982, vildi onkur hava at vita. Flemming Skovby segði, at fólk kunnu sjálvboðin fara til lækna at fáa eina blóðroynd. Ein annar møguleiki er, at teir føroysku myndugleikarnir gera av, at øll skulu kannast. Men tað er ein spurningur um pengar.

Danski granskarin nevndi í hesum viðfangi, at hann hevur mælt danska Heilsustýrinum til at kanna allar danir fyri psystiska fibrosu, sum er nógv vanligari í Danmark enn í øðrum londum, men at myndugleikarnir høvdu víst uppskotinum aftur. Hann vildi ikki taka støðu til, hvat føroyskir politikarar eiga at gera í sambandi við CTD, men nevndi, at øll bera eina ella aðra sjúu, so tað er ein spurningur um raðfesting.

-Tekniskt er tað gjørligt at kanna allar føroyingar fyri CTD, men tað mugu føroysku myndugleikiarnir gera av, segði Flemming Skovby.



*Flemming Skjovby er gengranskari á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn*

*Mynd: Árni Joensen*



*John Jensen, sum hevur mist tvey børn av Carnitin Transporter Defekt, hevði fingið Flemming Skovby til Esbjerg*

*Mynd: Árni Joensen*